DAGSINS MEINING

Góð umboð

Í seinastuni hevur verið nógv fokus á fótbóltinum, og hetta er einki løgið tí føroyingar standa seg eftir umstøðunum væl. Fótbólturin gevur okkum góða umrøðu úti í heimi, og leikararnir eru millum okkara bestu umboð uttanlanda. Aðrar ítróttargreinir eru eisini sera sjónligar eitt nú kappróðurin, ið er okkara tjóðarítrótt. Eisini henda ítróttagrein vekir ans millum útlendingar, tí hon er so sermerkt, og tí at kappróðrarbátarnir eru mest at meta við hitt besta listahandverk.

Hóast eitt nú fótbóltur og kappróður eru so sermerktar og sjónligar ítróttargreinir, eiga vit ikki at gloyma hinar ítróttagreinirnar. Her er sum kunnugt eitt ótal, og áhugin er stórur fyri at kalla øllum sløgum av ítrótti. Vit kunnu bert nevna t.d. flogbóltin, svimjingina og hondbóltin. ÍSF ger eitt stórt arbeiði fyri ítróttina eins og tað liggur eitt ómetaliga stórt sjálvboðið arbeiði aftan fyri alla føroyska ítrótt.

Sum nakað heilt fyri seg stendur tann ítrótt, sum verður íðkað innan ÍSB. Her hava ítróttafólkini gjøgnum tíðina vunnið framúrskarandi úrslit. Soleiðis hevur eisini verið seinastu árini, har eitt nú okkara svimjarar hava staðið seg sera væl í altjóða kappingum. Vit kunnu bert minna á, at tann unga Heidi Andreassen fyri stuttum vann bæði gull og silvurheiðursmerki á altjóða kapping í Bretlandi. Vit kunnu vera errin av Heidi og øllum teimum mongu ítróttarfólkunum, sum gera Føroyum heiður uttanlanda. Hesi fólk, tað veri seg landsliðsleikarar í fótbólti, ungir svimjarar ella hvørja grein, tað nú snýr seg um, eru framúr góð umboð fyri Føroyar og fyri føroyingar uttanlanda. Vit eiga at vera hesum fólkum takksom og tey hava uppiborið dyggan stuðul frá øllum samfelagnum. Hesi fólk hava sett sær høg mál og tey leggja alla orku í at náa hesum málum. Vit fegnast um at eiga slík fólk og vit eru øll góð við tey og ynskja teimum øllum alt tað besta og góða eydnu við teirra ítróttarliga virksemi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

www.javnratt.fo

Javnstøðuarbeiðið kann sammetast við at læra at súkkla

Í fyrstuni er tað so ringt, og mangan siga vit, at hetta læra vit aldrin. Og vit detta og fáa ilt, og tað kiksar. Men so við og við duga vit betur og betur. Vit detta ikki, men mugu konsentrera okkum um at súkla. Og til endans hugsa vit als ikki um, at vit súkla. Vit gera tað bara og tað er ongin trupulleiki.

So er eisini við fremjanini av javnstøðu millum kynini. Vit skulu ikki missa mótið, men dríva á at venja, og reisa okkum hvørja ferð, vit detta. So kemur tann dagur, har vit - uttan at hugsa um tað - taka javnstøðuatlit. Av teirri einføldu orsøk, at vit duga.

www.javnratt.fo
Hvat er javnstøða? Og hvat er ikki? Hví hava vit eina javnstøðunevnd og hvat fæst hon við? Svarið fæst við at hyggja á nýggju heimasíðuni, har m.a. ætlanin fyri 2003 liggur.

Ein Gallup-kanning um javnstøðu, vísur, at fólk flest halda, at javnstøða er fyri kvinnur og menn. Og at fólk eru ójøvn á máli um, hvørt vit í Føroyum hava javnstøðu millum kynini ella ikki. Hetta sæst á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini.

Á heimasíðuni eru eisini lýst nøkur øki, sum hava við støðuna millum kynini at gera. T.d. heimið og arbeiðsmarknaðurin, uppaling og læra, harðskapur, og kynjabýtið í politikki. *Les meira á heimasíðuni.*

Í sambandi við kunning um javnstøðu hoyra vit ofta um korini hjá kvinnum, meðan korini hjá monnum tykjast at vera illa lýst.

Hetta er kanska ikki so løgi, tí tað eru í flestu førum kvinnur, sum mynda javnstøðuarbeiðið og sum alment vísa málinum áhuga. Tað er kanska heldur ikki so løgi, tá hugsað verður um, at javnstøða er tætt tengt at spurninginum um fíggjarligt frælsi og harvið at støðuni hjá kynunum á arbeiðsmarknaðinum. Har eru kvinnur onkuntið fyri mismuni, m.a. tí tær bera og ansa børnunum, og tískil verða roknaðar óstabilar. Og tí tær traditionelt hava havt lægri løn og lægri tygn enn menn.

Sum dømi um øki, har menn eru fyri mismuni, kann nevnast foreldramyndugleika. At menn tann veikari parturin í hesum eru, er kanska heldur ikki so løgi, tí kvinnur hava rátt heima og átikið sær høvuðsábyrgdina av børnunum. Sum er, fær foreldrið, sum hevur verið mest saman við barninum, fyrimun, tá um foreldramyndugleika ræður og tað er í allarflestu førum mammurnar og ikki páparnir. Les meiri á heimasíðuni.

Javnstøðuarbeiðið hevur til endamáls at tryggja kynunum báðum góð kor, og at beina nevndu mismunir burtur.

Medvitið neyðugt
Umframt at kunna um viðurskifti, sum hava við javnstøðu millum kynini at gera, hevur sitandi javnstøðunevnd sum mál at virka fyri einari hugburðsbroyting millum fólk, stovnar, fyritøkur, feløg o.o., sum skal føra til, at javnstøðuatlit gerast náttúrligur partur í øllum avgerðum, sum hesi taka.

Tað er neyðugt, at vit gerast medvitað um støðuna millum kynini, til tess at kunna broyta tey viðurskifti, sum føra til, at annað kynið er fyri mismuni. Og tí mugu vit hvør í sær gera vart við okkum, tá vit sígga ella uppliva, at mismunur verður gjørdur vegna kyn. Tað nyttar ikki at lata sum luft ella siga, at vit ikki tora at úttala okkum.

Ábyrgdin er hjá okkum øllum - einstaklingum, arbeiðsgevarum, stovnum og fjølmiðlum o.ø.. Vit hava øll ábyrgd av, at Føroyar gerast eitt land, har javnstøða ikki bert er til á pappírinum, men eisini í gerandisdegnum - í veruleikanum.

Ísraelski sendiharrin í Danmark, Carmi Gillon, kemur til Føroya á vitjan í komandi viku

TÍÐINDASKRIV

Sendiharrin fer m. a. at hitta Anfinn Kallsberg, løgmann, Høgna Hoydal, varaløgmann og Bjarna Djurholm, vinnumálaráðharra. Eisini fer hann at hitta Birgith Kleist, ríkisumboðsmann og Jan Christiansen, borgarstjóra í Havn.

Ein av døgunum fer sendiharrin til Klaksvíkar, har Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri tekur ímóti og fer rundferð í Norðuroyggjum við sendiharranum.

Harafturat vitjar hann m.a. í Kirkjubø og á Eiði.

Hóskvøldið verður kvøldseta saman við føroyskum Ísraels-vinum, har sendiharrin er gestaraðari.

Um sendiharran:
Carmi Gillon er føddur í Jerusalem í 1950. Hann vaks upp har og gekk í studentaskúla á tónleikaakademinum.

Hevur útbúgvning í politiskum vísindi og umsiting frá lærda háskúlanum í Haifa og hevur lokið prógv á Harvard. Eisini er hann útbúgvin á ísraelska verjuakademinum.

Stóran part av manndómsárum sínum hevur Carmi Gillon starvast í GSS (General Security Services), eisini kent sum SHABAK, trygdartænasta Ísraels við anti-yvirgangsvirksemi í fremstu rað.

Hann var við í kríngum ímóti Egyptalandi í 1973, har hann eisini var særdur.

Aftaná at hava verið leiðari fyri SHABAK í tvey ár í 1995-96, starvaðist hann sum leiðari í privata vinnulívinum.

Í 2000 varð hann settur sum leiðari fyri "Perez"-Miðstøðini fyri Friði.

Hann er giftur við Sari - tey eiga trý børn.

Carmi Gillon hevur verið sendiharri Ísraels í Danmark síðan 11. september 2001.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Eru vit líka fyri lógini ???

Í desember 2002 lótu vit - grannar hjá tí sokallaðu Berjabrekku 3 byggingini, inn kæru til ætlan býráðsins at broyta byggisamtyktina fyri øki hjá Sp/F Høgna Mikkelsen/Býráðnum frá A1 til A3.

Síðani hava vit hvørki hoyrt orð ella eið um málið, burtursæð frá eini kvittan frá snarskivuni um at kæran var móttikin.

Men nú sæst lýsing í bloðunum, at øki verður boðið út, at gera byggibúgvi. So tað sær út til, at landsmynduleikarnir hava gingið býráðnum á møti og ikki okkum.

Men eftir standa fleiri ósvaraðir spurningar, ið høvdu verið áhugaverdir at fingið svaraðar.

Hví selur býráðið jørð, undan sínum egna dagstovni, til privatan entreprenør, og tað fyri bert nakrar og 60 kr./m2. ?

Tá vit grannarnir, mest sum av tilvild, fáa franir av hvørjar byggiætlanir ið fyriliggja, gera vit sjálvandi býráðnum greitt, at vit ikki brýggja okkum um at fáa stórar íbúðarblokkar beint upp í vindeygu okkara.

Vit hava búð í frið og náðum og við góðun útsýni her uppi í meiri enn tjúgu ár, og hava soleiðis vunni hevd uppá hettar.

Børnini á dagstovninum, hava ekkaleys spælt úti í Guds fríu nátturu. Men verður byggiætlanin fullført, kemur stovnurin at liggja í skugga allan seinrapartin, av íbúðarblokkum bygdum við Býráðsins vælsignilsi.

So vit gjørdu býráðnum greitt, at vit forvæntaðu, at teir hildu seg til byggisamtyktina fyri øki (A1).

Men tá hendur tað løgna, at býráðið byrjar at arbeiða við at fáa byggisamtyktina broytta til A3. Og var serliga tann eini arkitekturin heitur talsmaður fyri hesum.

Hví fer býráðið at knossast við at broyta byggisamtyktina fyri eitt jarðarstykki, ið teir longu hava selt. ? Og er hettar ikki kappingaravlagandi. ?

Hví broytir býráðið ikki alt øki undir Brúnni til A3. ?

Eiga grannarnir ikki líka góðan rætt sum Sp/F Høgni Mikkelsen til íbúðarspekulatión ? Um býráðið hevði sama kærleika og umtanka til grannarnar, so kundu vit bygt eina hædd afturat upp á hús okkara, býtt hvørja hædd í 2, og soleiðis fingið 6 íbúður og kanska selt tær fyri 1 mill. stk.

Ella er tað veruliga so, at Orwell og Animal farm liva í besta lagi í høvuðstaði okkara.

Tað burdi verið óneyðugt at mint á, at skattaborgararnir fíggja býráð og umsiting, og at hesi eru til fyri borgarans skuld og ikki øvugt.

Fyri at ein og hvør, ið hevur áhuga, sjálvur kann meta um, hvat í gongur fyri seg niðri á Vaglinum, verður kæran prentað niðanfyri.

Vinarliga

Egin Henriksen,
Jógvan Samson,
Hildur Sørensen,
Bjarke Sørensen,
Søren Havmand ,
Jóhannes Ellingsgaard,
Unn Mohr,
Berit Gunnarson,
Sólrun Joensen,
Marita Henriksen,
Martin Dam,
Gunnar H. Gunnarson,
Hildibjørg H. Ellingsgaard,
Annika á Lag
Tórshavn hin 12.06.03

Tórshavn hin 27.11.2002

Til
Tórshavnar býráð

Mótmæla broyting av byggisamtykt fyri økið hjá Sp/f Høgna Mikkelsen/Býráðnum frá A1 til A3.

Vit undirritaðu vilja hervið dyggiliga mótmæla at byggisamtyktin fyri økið verður broytt, og hava vit fylgjandi grundir.

Vit øll, sum liggja rundan um - norðan-, eystan- og vestanfyri áðurnevnda økið, fingu tey boð frá býráðnum, at okkara bygging skuldi bera dám av lágari bygging og skuldi verða til so lítlan ampa sum gjørligt fyri grannarnar.

Men nú tá býráðið er gingið saman við Sp/f Høgna Mikkelsen, ger man beint tað øvugta við tað, at man ætlar at pressa so nógvar eindir, sum tilber inn á eitt sera lítið øki.

Hetta, at man ætlar at stykkja hvørja lon í so nógvar íbúðir sum tilber, kemur sjálvandi at leggja eitt nógv størri trýst á økið, enn um talan var um raðhús ella vanliga sethúsa bygging.

Hvussu við kappingarlógini ??
Eitt er, at jørðin ikki er boðin út alment, men heldur er at kalla forerd burtur, hóast býráðið visti at kappingarlógin var í stoypiskeiðini og væl tað.

Jørðin hjá Sp/f Høgna Mikkelsen liggur í øki A1 í dag, og tað visti keyparin, tá hann keypti.

Fer man nú at broyta hetta til A3, so favouriserar man keyparan uppaftur meira enn man longu hevur gjørt, og má hetta verða brot á kapppingarlógina.

At býráði ætlar at broyta byggisamtyktina heilt oman til ringvegin/Útvarpshúsið er sjálvsagt, tá man kortini fer at broyta. Men tað er byggiætlanin hjá P/f Høgna Mikkelsen, sum hevur útloyst hetta. Ja, tað er "simpult hen" fyri at geva Høgna Mikkelsen so góðan økonomi í byggiætlanina sum til ber. Hetta er komið greitt fram á fundum, vit hava havt við býráðsumsitingina.

Tað at byggiharrin/keyparin sjálvur situr í býráðnum, og enntá er partur av meirilutanum, ger hetta málið uppaftur eeðiligari.

Vit tora við vissu at siga, at um onkur av okkum, fyri nøkrum mánaðum síðani, høvdu sent býráðnum umsøkn um at sleppa at stykkja okkara hús út í fleiri íbúðir og selt til einar 3 ella 4 keyparar (broytt byggisamtykt frá A1 til A3), so hevði hetta verði blankt avvíst.

So hetta málið vísur bert enn einaferð, at vit eru ikki øll líka fyri lógini, og er tað sera spell. Ja, hetta er umsitingarligt svans, sum ikki er einum framkomnum demokratiskum samfelag verdugt.

E.S.
Til Landsmynduleikarnar.
Tá tit fáa Byggimálið og kæruna til viðgerðar, vilja vit inniliga heita á tykkum um at kanna, um alt er gingi rætt fyri seg, viðvíkjandi sølu/keypi av byggilendinum hjá Sp/f Høgna Mikkelsen.

Her verður serliga hugsa um, hví býráðið ikki hevur bjóða lendið út alment og til hægst bjóðandi. Tað er jú skattaborgarans pengar teir umsita.

Er tað ikki eisini í stríð við kappingarlógina, nú, eftir at handilin er framdur, at fara at broyta byggisamtyktina frá A1 til A3.

Í øllum førum vil hendan broytingin geva byggiharranum nógv størri møguleikar, og kundi tað ikki hugsast, at aðrir entreprenørar høvdu verði stórliga áhugaðir í økinum, eftir eina broytta byggisamtykt - hvat sigur kappingarlógin ???

Við heilsan

(ca. 80 undirskriftir)

Konsert við Kristiliga Sangkórinum

TÍÐINDASKRIV

Kristiliga Sangkórið hevur konsert í kommunuskúlanum sunnudagin 15. juni 2003 kl. 16.00. Tað eru í ár fimmti ár síðan kórið varð sett á stovn, og í hesum sambandi er ætlanin at fara uttanlandsferð til Danmark, Noregs og Svøriki. Eisini er ætlanin at geva eina fløgu út við sálmum og sangum sum kórið hevur sungið.

Borigóðkenning til ENI Denmark BV

TÍÐINDASKRIV
frá Oljumálaráðnum

Seinnapartin í dag fer Oljumálaráðið at lata italienska oljufelagnum ENI Denmark BV góðkenning at fara undir leitiboring eftir olju í loyvisøki 002 á føroyska landgrunninum.

ENI Denmark BV er fyristøðufelag í ENI samtakinum, har ENI Denmark BV og Føroya Kolvetni umboða ávikavist 75% og 25% av loyvinum.

Boriskipið Belford Dolphin, sum skal bora brunnin hjá ENI samtakinum, er á veg móti Føroyum og verður væntandi á boristaðnum ein av nærmastu døgunum.

Loyvisøkið liggur í ein landssynning úr Føroyum við landgrunsmarkið millum Føroyar og Bretland. Brunnurin verður boraður á Marimas leitimiðinum á 60° 29' 46.78"N og 04° 47' 30.85" V. Havdýpið á staðnum er 1048 metrar.

Boringin er mett at taka slakar 2 mánaðir.

ENI er nýggja navnið hjá oljufelagnum Agip. Brunnurin skuldi sambært leitiloyvinum verið boraður í 2002, men ENI søkti um og fekk loyvi at útseta boringina eitt ár, av tí at úrslitini frá leitiboringunum í 2001 vístu, at jarðfrøðiligu viðurskiftini á føroyska økinum sum heild vóru øðrvísi, enn roknað varð við frammanundan. Hetta kravdi, at arbeiðið, sum til tá var gjørt á økinum, varð endurskoðað.

Boringin hjá ENI er fjórða leitiboringin á landgrunninum. Tríggjar boringar vóru í 2001. Sambært loyvistreytunum skulu oljufeløgini bora tilsamans 8 brunnar innan 6-ára loyvisskeiðið er runnið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til
Oljumálaráðið
Telefon 35 70 70
Teldupost: omr@omr.fo
www.omr.fo

Gongutúrur niðan á Núgvuna

TÍÐINDASKRIV
frá Skótafylki Sigmunds Brestissonar

Nú verður aftur farið til gongu nú sunnudagin 15. juni. Leiðin gongur hesaferð niðan á Núgvuna.

Allir gamlir leiðarar og skótar, kvinnur og menn, frá tiðini niðri á Bakkahellu og fram til í dag, eru vælkomin við.

Vit møtast í skótahøllini kl. 13.30. Koyrt verður niðan til Sornfelli, har farið verður til gongu. Túrurin tekur umleið 3 tímar.

Drekkamunnur verður í Skótahúsinum eftir túrin.

Møtið fjølment.